# Neyðuga Prix fløgan



*Umboð fyri bólkarnar, sum eru við á fløguni Prix krem*

*Mynd: Heri á Rógvi*

Loksins er fløgan frá ársins Prix Føroyar finalu komin út. Á samkomu í 3´aranum segði Edvard Nyholm Debes frá Ùtvarpi Føroya, at fløgan er ein neyðug fløga.

– Hetta er eitt neyðugt tiltak og ein neyðug fløga. Fleiri av bólkunum høvdu annars ikki komið fram, sigur Edvard Nyholm Debes.

Tað er Útvarp Føroya, sum sjálvt stendur fyri at geva fløguna út.

–Vit verða ikki ríkir av hesum, tí hetta kostar nógv, men vit meta tað vera neyðugt, sigur Edvard Nyholm Debes.

Fløgan kallast Prix Krem, og er hetta tann triðja Prix Føroyar fløgan í røðini.

Hesa ferð hava teir seks bólkarnir tveir sangir í part við á fløguni. Allir sangirnir vórðu tiknir upp á Prix Føroyar finaluni 26. apríl, har Gestir sum kunnugt vunnu.

# Mentanarkvøld í Sjónleikarhúsinum

**Hvørt týskvøld í summar verða mentunarkvøld í Sjónleikarhúsinum**

Hvørt týskvøld frá 17. juni til 26. august – undantikið á ólavsøku – verða mentanarkvøld í Sjónleikarhús-inum í Havn. Hesi kvøldini hava verið roynd áður, og nú verður farið í holt við enn eitt summar við mentan.

Talan er um eina kvøldsetu, sum byrjar týskvøld kl. 20 og heldur á í nakrar tímar.

Sjónleikur, tónleikur, dansur og sangur verður at síggja og hoyra í brotamynd av søgum og søgnum, yrkingum, sangum og skjaldrum.

Í tíðindaskrivi sigur Sjónleikarhúsið, at trivið verður niður í dýrgripin av føroyskum skaldskapi – gamalt sum nýtt.

Av yrkjarum kunnu nevnast: William Heinesen, Christian Matras, Rói Patursson, Tórdoddur Poulsen og Sigrid Gaini.

Framførslan er á skandinaviskum og enskum, men sungið verður á føroyskum.

Sjónleikarar úr Havnar Sjónleikarfelag fara at framføra.

Tónleikin hevur Uni Reinert Debes undir hond. Oddvør Petersen hevur gjørt pallmyndina, Símun Pauli Hansen og Hjalmar Holm standa fyri ljósinum og Egi Dam og Birita Mohr hava lagt til rættis og sett saman.

– Umframt framførsluna verður føroyskur dansur sýndur fram. Gestirnir sleppa at royna føroyskan mat, og at enda verður føroyskur dansur, har gestirnir hava møguleika at luttaka, skrivar Havnar Sjónleikarfelag í tíðindaskrivi.

# Strandingar hava viðrák í hondbólti

**- Men tað er kostnaðarmikið at reka felagið so professionelt, sum vit gera, sigur formaðurin í Stranda Ítróttarfelag, Andrass Danielsen**

FJARÐASTEVNAN
*Vilmund Jacobsen*

Adrass Danielsen er formaður í Stranda Ítróttarfelag. Tað hevur hann verið síðan á aðalfundi felagsins í 1998. Hesi árini hevur felagið verið rikið rættiliga professionelt við løntum venjarum til bæði dreingir, gentur, kvinnu og menn.

Hesi árini hevur StÍF havt stóra framgongd. Felagið hevur vunnið tvey FM-heiti fyri menn í hondbólti, umframt tvær steypakappingar í somu deild. Í øðrum deildum bæði hjá gentum og dreingjum, hevur byrðurin eisini verið góður, og felagið hevur hesi árini vunnið FM-heitir í flestu deildum.



*StÍF hevur havt góðan byr, síðan Andrass Danielsen gjørdist formaður í felagnum í 1998.*
*- Vit vóna, at nógv fólk koma at vitja okkum á hesi fyrstu Fjarðastevnuni á Strondum, sigur hann.*

## Uppbyggingararbeiði

Tað er bara hjá kvinnunum, at tað ikki hevur gingið so væl.

Andrass Danielsen sigur, at her er neyðugt við einum uppbyggingararbeiði, sum væntandi fer at geva úrslit um nøkur ár. Tað var soleiðis, at Skála hevði hondbóltin hjá kvinnunum, og síðan var ítróttargreinin í einum aldudali, áðrenn StÍF tók táttin uppaftur á Strondum.

- Vit hava góðar gentur, sum í dag eru upp til 16 ára gamlar. Tá ið hesar eru vorðnar eitt sindur eldri, ivast vit ikki í, at tær eisini koma at síggjast aftur í hondbóltinum, sigur hann.

## Kostnaðarmikið

Andrass Danielsen sigur, at tað er rættiliga kostnaðarmikið hjá einum felag, sum verður rikið so professionelt, sum StÍF verður rikið.

- Vit hava tveir venjarar, sum arbeiða hjá felagnum fulla tíð. Annar tekur sær av øllum mansdeildunum, heilt frá 10 árum og uppeftir. Tað sama er við kvinnunum.

Hann vísir á, at tað tí er ein stór uppgáva hjá felagnum at útvega inntøkur til tann aktivitet, sum felagið hevur.

- Her krevst nógvur peningur, og neyðugt er tí við tiltøkum av ymiskum slagi og góðum stuðlum, um alt skal fáast at hanga saman fíggjarliga, sigur Andrass.

## Stevnuspent

- Vit eru ógvuliga spent, nú tann fyrsta Fjarðastevnan verður hildin á Strondum.

Formaðurin í StÍF sigur, at strandingar hava tikið væl ímóti stevnuni, og hóast tíðin er stutt, er nógv gjørt til tess at fáa eina góða stevnu við nógvum og áhugaverdum tiltøkum.

- Tey, sum sita í nevndini, ið fyrireikar stevnuna, hava gjørt eitt stórt og gott arbeiði.

Andrass er róðrarfeløgunum kring landið sera takksamur fyri, at tey stuðlaðu uppskotinum um, at Fjarðastevnan, sum nú er veruleiki, kann skifta ímillum vesturarmin á Skálafjørðinum og Vestmanna annaðhvørt ár.

- Fyrsta stevnan verður so á Strondum nú í vikuskiftinum. Tíðin til fyrireikingar hevur verið ógvuliga knøpp, men eg ivist onga løtu í, at tey, sum nýta høvi at vitja okkum í vikuskiftinum, fara ikki vónsvikin avstað aftur, sigur hann.

## Nógvir stuðlar

Andrass sigur, at nú StÍF av álvara hevur havt viðrák seinastu árini, hevur felagið eisini merkt ein ótrúligan stuðul - fyrst og fremst í bygdafólkinum, men eisini millum teir strandingar, sum búgva aðrastaðni.

- Tá ið vit eru til dystir í eitt nú høvuðsstaðnum, er ikki óvanligt, at líka nógvir strandingar eru og hyggja sum havnafólk. Nú stevna verður, vóna vit, at hesir stuðlar eisini vitja heimaftur og vilja njóta stevnuna saman við okkum og øllum øðrum, sum leita higar. Vit vóna eisini, at tey kapp-róðrarfeløg, sum stuðlaðu okkum so væl, tá ið henda 7. stevnan skuldi leggjast, koma at vitja stevnuna hjá okkum í vikuskiftinum, sigur Andrass Danielsen, formaður í StÍF.

At enda nýtir hann høvi at ynskja øllum eina góða Fjarðastevnu.





*Portørarnir á Landssjúkrahúsinum hildu uppá, at teir høvdu ikki ábyrgdina av hesum pínliga mistaki. - Teir vóru eitt sindur fáligir, men vit fingu ikki so frægt sum eina umbering, sigur dóttirin, sum saman við manni sínum og 87 ára gomlu mammuni fann skeivan mann í kistuni, tá ið andaktin yvir pápan skuldi vera í kapellinum á Landssjúkrahúsinum*

Tey avvarðandi vóru skelkað:

# Tað var ikki pápi sum lá í kistuni

**Síðst í apríl hendi eitt pínligt mistak á Landssjúkrahúsinum, sum í ringasta føri kundi ført til, at eitt lík bleiv grivið uppaftur.**
**Tá ið tey avvarðandi komu í kapellið, vóru nøvnini á kransum og børuprýðinum tey røttu, men maðurin í kistuni var ein annar. Seinni kom onnur kista í 6-tímarúmið við pápanum, beinleiðis úr kuldarúminum**

MISTAK
*Vilmund Jacobsen*

Dagurin er, 29. apríl í ár. Ein 87 ára gomul kona, dóttir hennara og maðurin eru komin í kapellið á Landssjúkrahúsinum í góðari tíð. Tann gamli er deyður, og lýst er, at kistan fer úr kapellinum kl. 17. Tey avvarðandi ætla at síggja mannin, pápan og verfaðirin eina seinastu ferð og vera hjá líkinum eina stund, áðrenn lokið verður lagt á.

Tey trý koma innar. Alt sær í fyrstani út, sum tað eigur. Har eru kransar, blómur og við kistuna stendur lokið við børuprýðinum á.

## Ikki pápi!

- Eg var fyrst av okkum at ganga fram ímóti kistuni hjá pápa. Tað fyrsta, eg legði til merkis, var, at maðurin í kistuni var í sínum egnu klæðum og ikki í líkverju. Spyrji meg sjálva, hvat hetta er fyri nakað? Fari nærri og síggi, at tað er ikki pápi, sum liggur í kistuni, men ein annar maður. Hyggi at kransunum og niður á børuprýði á lokinum. Jú, hetta eru okkara.

Soleiðis greiðir dóttir til mannin, sum skuldi úr kapellinum hendan dagin, frá.

- Eg vendi mær á móti mammu og manni mínum, sum standa aftanfyri meg. Biði tey seta seg niður, tí hetta er ikki pápi, men ein annar maður. Mamma, sum er 87 ára, gomul, gjørdist rættiliga skelkað av hesum.

Dóttirin greiðir frá, at hon síðan fór at vita, um hon kundi finna onkran, ið kundi siga teimum, hvussu hetta hekk saman.

- Uppi í kjallaranum møtti eg eini sjúkrasystir. Sigi við hana, at vit høvdu fingið at vitað, at vit kundu koma í kapellið kl. 15 at síggja pápan og vera saman við líkinum eina løtu, áðrenn lokið varð lagt á. Sjúkrasystirin fekk so fatur á einum portøri. Hann fer yvir í kapellið, hyggur at einum seðli, sum hongur á lokinum og sigur, at maðurin, sum liggur í kistuni, fer úr kapellinum kl. 16, sum andaktin yvir pápa verður kl. 17.

Portørurin sigur nú við konuna, at pápi hennara stendur í 6-tímarúminum.

- Men portørurin kemur aftur og sigur, at har er heldur eingin kista við pápanum. Men hon skuldi verið har, leggur hann aftrat.

## Ísakaldur

Tá ið saman um kom, høvdu pørtørarnir slett ikki tikið líkið úr kuldarúminum. Seinni komu teir so við pápanum og settu hann ísakaldan inn í 6-tímastovuna.

- Hann var simpulthen so ísakaldur, sigur hon.

Dóttirin ringir nú til blómuhandilin hjá Trónd Hansen og biðir tey koma út á Landssjúkrahúsið at flyta børuprýði av lokinum hjá tí skeiva manninum á lokið hjá pápanum. Somuleiðis bera tey kransar og blómur upp í 6-tímarúmið, har pápin nú liggur.

- Pørtørurin segði, at hin maðurin fór úr kapellinum klokkan 16, men klokkan gongur, og tíðin nærkast. Eingin avvarðandi hjá hesum manni kemur í kapellið, og eg hugsi við mær, at neyðars maður, sum ongan góðan hevur.

Og dóttirin greiðir víðari frá:

- Tann, sum hevur dagligu leiðsluna í kapellinum, er nú komin, tí tíðin nærkast til andaktina hjá pápa. Hon veit at siga, at maðurin, sum liggur í kistuni, fer ikki úr kapellinum í dag, men seinnapartin í morgin. Hon fer tí eftir portørunum og fær teir at taka kistuna við manninum úr kapellinum, so pápi kann koyrast oman. Síðan fóru vit at bera allar kransarnar omanaftur í kapellið.

Dóttirin sigur, at portørarnir hildu uppá, at teir høvdu ikki ábyrgdina av hesum pínliga mistaki.

- Teir vóru eitt sindur fáligir, men vit fingu ikki so frægt sum eina umbering, sigur hon.

## Uppafturgrivin

Sonur til gamla mannin, sum skuldi úr kapellinum hendan dagin, sigur, at tá ið hann kom í kapellið klokkan 16 - ella ein tíma fyri andaktina - var mistakið framvegis ikki rættað, og kistan við skeiva manninum stóð framvegis inni á gólvinum.

- Tá ið eg kom á Landssjúkrahúsið, stóð kistan við pápa í 6-tímarúminum, og har sótu tey avvarðandi og bíðaðu. Eg haldi, at klokkan mundi vera 16.30, áðrenn hin maðurin fór úr kapellinum, og pápi kundi koyrast oman.

Sonurin sigur, at høvdu tey avvarðandi ikki biðið um at síggja pápan fyri andaktina, hevði lokið ligið á kistuni, tá ið tey komu í kapellið. Tá kundi maðurin, sum lá í kapellinum, verið grivin á Norðskála ístaðin fyri í Fuglafirði.

- Andaktin yvir mannin, sum lá í kapellinum, tá ið vit komu suður, skuldi ikki vera fyrr enn seinnapartin dagin eftir. Jarðarferðin hjá pápa skuldi nevniliga vera hendan dagin klokkan 14. Tí kundi tað lættliga hent, at skeivur maður varð jarðaður, áðrenn nakar fann út av, at Landssjúkrahúsið hevði framt hetta pínliga mistak.

Sonurin vísir á, at hevði hvørgin av familjunum valt at síggja líkini fyri andaktina, er sannlíkt, at líkið, sum skuldi jarðast í Fuglafirði, endaði á Norðskála og øvut.

- Og tá hevði hetta mistak ongantíð komið fyri ein dag aftur, sigur hann.

Hann leggur dent á, at høvdu tey havt jarðað annan mann enn pápan í kirkjugarðinum á Norðskála, høvdu tey avvarðandi avgjørt kravt, at líkið varð grivið uppaftur, og at pápin fekk tað plássið, honum var tillutað.

- Tað er ófatiligt, at hetta kundi henda á Landssjúkrahúsinum, sigur sonurin.

22 ár vóru á muni millum teir báðar, sum skuldu berast úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum, ávikavist, 29. og 30. apríl.